**Poul Michelsen**
**Sjúrður Skaale**
**Helgi Abrahamsen**
**Hans Pauli Strøm**
**Høgni Hoydal**
**Jenis av Rana**
**John Johannesen**
**Kári á Rógvi**
**Jaspur Vang**
**Jógvan á Lakjuni**
**løgtingsmenn**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 140/2009: Uppskot til løgtingslóg um Stjórnarskipan Føroya**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um Stjórnarskipan Føroya**

# Stjórnarskipan Føroya

***Formæli***
*Vit, Føroya fólk, samtykkja hesa stjórnarskipan. Hon er grundvøllur undir stýri okkara, ið skal tryggja frælsi, trygd og trivnað.*
*Vit bygdu landið í fornari tíð og skipaðu okkum við tingi, lógum, rættindum og skyldum.*
*Vit hava hildið ting til henda dag og skipað okkum eftir tørvi okkara um landið alt.*
*Føroyar hava í øldir samstarvað við onnur lond og ríki. Einki kann tó køva sjálvræði landsins ella sjálvsavgerðarrætt okkara.*
*Landsins egnu lógir eru einans tær, sum gjørdar eru á rættan hátt í landinum sjálvum eftir fólksins vilja.*
*Føroyar verða skipaðar eftir nútíðar tørvi og eftir siðaarvi okkara við fólkaræði, løgræði, rættindum og skyldum.*
*Allar lógir og siðvenjur skulu virða hesa stjórnarskipan. Eingin lóg ella siðvenja má tí vera hildin at hava gildi, bara tí hon er eldri enn henda skipan ella hevur virkað í langa tíð.*

# Fyrsti partur – Stýrislag

**§ 1. Fólkið og landið**

(1) Føroyar eru land, føroyingar eru tjóð og alt vald í landinum er hjá Føroya fólki.
(2) Føroyar hava sambært sáttmálum samstarvað við onnur lond og kunnu framvegis samstarva við onnur lond sambært sáttmála.
(3) Um gjørt verður av at lata samveldisstovnum vald, ið annars liggur hjá landsins myndugleikum, skal hetta verða væl lýst í millumtjóða sáttmála. Løgtingið skal samtykkja slíkan sáttmála, áðrenn fólkið tekur endaliga avgerð á fólkaatkvøðu í minsta lagi eitt hálvt ár og í mesta lagi eitt ár seinni.
(4) Eitt og hvørt samveldissamstarv kann á sama hátt sigast úr gildi, har fólkið skal taka endaliga avgerð á fólkaatkvøðu í minsta lagi eitt hálvt ár eftir og í mesta lagi eitt ár eftir at Løgtingið hevur tikið støðu sína. Vanligur meiriluti skal ráða.

**§ 2. Valdsbýti**
(1) Føroyar eru land við fólkaræði. Fólkið fremur vald sítt gjøgnum Løgtingið, Føroya Landsstýri og dómstólar.
(2) Løgtingið ger landsins lógir, landsstýrið staðfestir og umsitur lógirnar og dómstólarnir døma eftir lógunum. Løgting, landsstýri og dómstólar skulu halda seg innan fyri vald sítt og heimildir.
(3) Løgtingið er fólkavalt.

**§ 3. Rættvísi**
(1) Stjórnarskipanin er grundað á valdsbýti og løgræði. Umframt rættindi ásett í hesi skipan, verjir hon onnur rættindi, sum eru sjálvsøgd.

**§ 4. Ímyndir og mál**
(1) Føroyar hava flagg, tjóðsang og skjaldrarmerki.
(2) Føroyskt er tjóðarmál og alment mál.

## Annar partur - Rættindi og skyldur

**§ 5. Rættindi og verja teirra**
(1) Rættindi kunnu einans avmarkast við lóg og í samsvari við hesa stjórnarskipan.
(2) Rættindi kunnu knýtast at heimarætti ella bústaði.
(3) Landsins myndugleikar skulu altíð verja rættindi hjá íbúgvum landsins.

**§ 6. Skyldur**
(1) Øll skulu virða hesa skipan og tær lógir, skyldur og rættindi, sum verða til í samsvari við hana.
(2) Øll eiga at virða landsins arv og tilfeingi eins og rættindi hjá øðrum.

**§ 7. Javnstøða**
(1) Øll fólk eru javnsett uttan mun til kyn, eyðkenni ella frábreðgi.
(2) Eingin munur má vera tilvildarligur, órættvísur ella mannminkandi.

**§ 8. Lív og trygd**
(1) Øll eiga rætt til lív og trygd.
(2) Eingin kann verða revsaður ella viðfarin miskunnarleyst ella óvirðiliga.
(3) Deyðarevsing kann ikki ásetast.

**§ 9. Persónligt frælsi**
(1) Øll eru fræls og frí og vard móti ágangi.

(2) Frælsistøka kann einans fremjast við lóg. Avgerð sambært slíkari lóg kann leggjast fyri dómara.
(3) Verður ein handtikin fyri brotsverk, skal hann fyri dómara innan 24 tímar. Bert dómari kann staðfesta ella leingja handtøku.
(4) Dómari kann áleggja longri varðhald, tó í mesta lagi fýra mánaðir, og bert um longri revsing er væntandi. Dómari kann kortini í heilt serligum førum áleggja longri varðhald enn fýra mánaðir.
(5) Dómari kann í serligum førum áleggja varðhald í einingi ella partvísari avbyrging, tó í mesta lagi í tveir mánaðir.

**§ 10. Bústaður og samskifti**
(1) Bústaðir, ognir og alt privat samskifti eru vard fyri inntrivum.
(2) Er neyðugt sambært lóg og landsins tørvi at gera rannsókn, leggja hald á ella gera onnur inntriv, skal dómari í úrskurði gera av, um tað er loyviligt. Er tað ógjørligt undan inntrivinum, skal úrskurður gerast aftaná.

**§ 11. Ognarrættur**
(1) Allar ognir og øll rættindi eru vard fyri ágangi.
(2) Almennur myndugleiki kann eftir mannagongd í lóg taka ræði á privatari ogn ella rætti. Tílík lóg skal samtykkjast av tveimum triðingum av tinglimum, og ognartøkan skal fara fram sambært neyðugum og átrokandi almennum tørvi.
(3) Fyri slíka ognartøku skal fult endurgjald latast.

**§ 12. Trúarfrælsi**
(1) Øll eiga rætt at trúgva og útinna sína trúgv.
(2) Kristnitrúnni kunnu verða veittar serligar sømdir, tó uttan at gera seg inn á aðrar fatanir.
(3) Fólkakirkjan eigur lut eftir gomlum siði.

**§ 13. Valrættur**
(1) Val til Løgting, kommunustýri og fólkaatkvøður fara fram á almennum, loyniligum og beinleiðis vali. Í lóg verður ásett, hvør er valbærur, og hvør hevur valrætt.

**§ 14. Framsøgufrælsi**
(1) Ein og hvør eigur rætt til undir ábyrgd at hava og bera fram sína hugsan.
(2) Á sama hátt eiga øll rætt at vera við í samskifti og taka ímóti upplýsing.

**§ 15. Felagsfrælsi**
(1) Øll hava rætt at taka seg saman í feløg og fylkingar til eitt og hvørt endamál.
(2) Feløg og fylkingar kunnu avsigast, um atlit at trygd, friði og landaskili krevur tað.

**§ 16. Savningarfrælsi**
(1) Øll eiga rætt at savnast á almennum staði, um hetta ikki brýtur trygd, frið og landaskil.

**§ 17. Vinna og arbeiði**
(1) Øll eiga javnbjóðis rætt til at reka vinnu og handil.
(2) Øll eiga javnbjóðis rætt at arbeiða.

**§ 18. Skúli**
(1) Øll eiga javnbjóðis rætt til undirvísing. Øll hava skyldu at taka við undirvísing í barna- og ungdómsárum.
(2) Foreldur kunnu sjálvi taka á seg ábyrgd av undirvísing barnanna, men dygdin skal vera eins góð og tann, ið tað almenna bjóðar.

**§ 19. Sosial trygd**
(1) Øll eiga rætt til sømilig kor.
(2) Landið skal hava umsorgan fyri, at øll fáa virðilig ellisár.
(3) Tann, sum hvørki sleppur fram at egnari vinnu ella løntum arbeiði, eigur at fáa almennan stuðul og styrk.

**§ 20. Familja**
(1) Landið tryggjar familjuni góðar umstøður.
(2) Børn eiga rætt til at vaksa upp undir tryggum og góðum korum.

**§ 21. Innløgurættindi**
(1) Øll eiga rætt til egna innløgu.
(2) Nú reka menn hval á land upp; tá skal tað mesta vera drápspartur ella heimapartur.
(3) Landið skal gera tær avmarkingar, sum neyðugar eru til tess at tryggja fæstovnar, innløgurætt, búseting og náttúrutilfeingi.
(4) Tá ið íbúgvar leggja inn á sjónum ella á landi til sín sjálvs, uttan at gjald er uppií, skal innløgan vera teimum frí og fingin.

**§ 22. Hvørsmansrættur**
(1) Øll eiga rætt at ferðast og fara á sjógvi og landi, tá ið tað ikki er fólki, fæi og náttúru til ampa.

**§ 23. Óðalsjørð og landsjørð**
(1) Er ætlanin við lóg at einskilja landsjørð, skal henda lóg leggjast til fólkaatkvøðu í minsta lagi eitt hálvt ár eftir- og í mesta lagi eitt ár eftir, at Løgtingið hevur samtykt hana.
(2) Tingið kann áseta reglur um stødd á óðalsjørð.

**§ 24. Tilfeingi og umhvørvi**
(1) Myndugleikarnir varða um tilfeingi landsins.
(2) Tá vunnið verður úr landsins tilfeingi, skal landið antin krevja viðurlag ella tryggja øllum vinnurætt.
(3) Margfeldið á landi og á havleiðum landsins, sum privat ikki eiga, er tilfeingi og ogn fólksins.
(4) Landið tryggjar, at bæði almenna og privata tilfeingi landsins verður umsitið á sjálvberandi hátt við umsorgan fyri umhvørvinum.

# Triði partur - Fyrisiting

**§ 25. Fyrisitingarlig rættindi**
(1) Øll eiga rætt til fyrisiting, sum er grundað á lóg, góðan fyrisitingarsið, opinleika og gjøgnumskygdar mannagongdir.

(2) Allar fyrisitingarligar avgerðir skulu vera sakliga grundaðar, og allar metingar og grundgevingar av týdningi skulu vera skjalfestar.
(3) Tekur almennur stovnur ella myndugleiki fyrisitingarliga avgerð, ið gongur ímóti áhugamálum hjá borgara, skal hann hava skrivliga grundgeving.
(4) Fyrisitingarlig rættindi og mannagongdir skulu ásetast í lóg, sum m.a. skal áseta rætt til innlit í almenn viðurskifti, egin viðurskifti og avgerðarmál, rætt til at leggja fyrisitingarliga avgerð fyri óhefta kærunevnd ella dómstól, rætt til hoyring um avgerðir og fyriskipanir; rætt at lata onnur umboða seg í almennum málum, og krøv um gegni í fyrisitingini.

**§ 26. Kommunur**
(1) Føroyar eru skipaðar í kommunur undir landsins eftirliti. Løgtingið ásetir, í hvønn mun kommunur kunnu skuldbindast við láni, borgan og á annan hátt.
(2) Kommunustýrini eru fólkavald sambært lóg og skipa viðurskiftini á staðnum.
(3) Kommunur kunnu við heimild í lóg álíkna skatt til tess at fíggja tær uppgávur, sum eru álagdar teimum.

# Fjórði partur - Dómsvald

**§ 27. Skipan**
(1) Dómsvaldið er hjá óheftum dómstólum, sum verða skipaðir sambært lóg. Rættargangur er almennur og skipaður við í minsta lagi tveimum rættarstigum. Rættargangur kann kortini vera lokaður, um serlig viðurskifti krevja tað.
(2) Dómari skal í yrki sínum bert halda seg til lógina. Dómari kann bert verða loystur úr starvi, tá hann hevur nátt galdandi fráfaringaraldri, um umskipan av dómstólunum ber við sær, at hann verður fluttur í annað starv, ella við dómi.
(3) Reglur um tilnevning av dómarum og um setanarviðurskifti teirra verða ásett í lóg.

**§ 28. Skuldseting og ákæra**
(1) Skuldseting og ákæra kunnu einans setast fram sambært heimild í lóg.
(2) Eingin kann revsast uttan beinleiðis heimild í lóg.

**§ 29. Leikfólk í rættargongdini**
(1) Nevningar skulu døma í strongum revsimálum.
(2) Í øðrum revsimálum kunnu eisini dómsmenn døma saman við løgfrøðiligum dómara.
(3) Serkøn fólk kunnu eisini luttaka sum dómarar í rættarmálum.

**§ 30. Rættarmál**
(1) Øll eiga rætt at vera umboðað í revsimálum ella øðrum málum, sum tað almenna reisir móti teimum.
(2) Rættindi til sakkøna umboðan og fría málsgongd skulu nágreinast í lóg.

# Fimti partur – Stýrisskipan

**Løgting**

**§ 31. Heimildir**
(1) Á tingi fær fólkið rødd og tekur støðu sína.
(2) Umframt løgtingsmenn kunnu løgmaður *og* landsstýrismenn leggja uppskot fyri tingið.
(3) Løgtingsuppskot, ið Løgtingið hevur samtykt, fær lógargildi, tá ið tað er staðfest av løgmanni og kunngjørt innan 30 dagar eftir samtykt.

**§ 32. Lóggávumannagongd**
(1) Lógaruppskot skulu fyri tingið tríggjar ferðir. Eftir aðru viðgerð kunnu bert smávegis broytingar gerast.
(2) Tveir triðingar av tingmonnum kunnu samtykkja, at lóg fær gildi við afturvirkni, tó bert um lógin er til fyrimuns fyri borgaran.
(3) Eftir val og eftir at tingárið er endað, falla øll framløgd uppskot burtur.
(4) Løgtingið kann veita landsstýrismonnum heimild at áseta almennar reglur í kunngerð.
(5) Løgtingið kann leggja spurningar til vegleiðandi fólkaatkvøðu
(6) Ein triðingur av tingmonnum kann krevja lóg lagda til vegleiðandi fólkaatkvøðu eina viku eftir, at hon er samtykt. Lógir um fíggjar-, lønar- og skattamál og lógir um útinning av galdandi millumlanda sáttmálum kunnu ikki leggjast til fólkaatkvøðu.

**§ 33. Val**
(1) Løgtingið hevur í mesta lagi 33 limir.
(2) Løgtingið ásetur valskipan í lóg.
(3) Valbærur er hvør, sum hevur valrætt til løgtingið.
(4) Tingið ger sjálvt av, hvør av røttum er valdur.
(5) Tingið ger av, um tingmaður, sum, eftir at hann varð valdur, er dømdur fyri brotsverk, ið kann hava við sær minst fýra mánaða fongsulsrevsing, eigur at sita á tingi.

**§ 34. Valskeið**
(1) Tingið verður valt fyri fýra ár í senn. Løgmaður skrivar út val.
(2) Løgmaður kann skriva val út í ótíð, men tá kunnu tveir triðingar av løgtingsmonnum innan 24 tímar broyta hesa avgerð við einum uppskoti um misálit á løgmann.
(3) Løgtingið kann samtykkja, at val skal vera í ótíð.
(4) Gamla tingið eigur sæti, til nýggja tingið er sett.
(5) Tingformaður setir tingið 12. yrkadagin eftir val.
(6) Val skal skrivast út í minsta lagi fýra vikur og í mesta lagi seks vikur fyri valdagin.

**§ 35. Tingstarv**
(1) Tingmenn røkja sætið sum álitisstarv og eru bert bundnir av sannføring síni.
(2) Samsýning og eftirløn hjá tingmonnum og landsstýrismonnum verða ásettar eftir tilmæli frá serligari nevnd. Broytingar fáa gildi eftir næsta val.

3) Tingmenn mugu ikki vera í álitisstørvum, í ráðum og nevndum undir landinum ella sita sum dómarar. Verður tingmaður landsstýrismaður ella løgmaður, tekur varamaður sæti á tingi.

**§ 36. Tingformaður**
(1) Tingið velur formann og næstformenn.
(2) Tingformaður situr alt valskeiðið, uttan so, at tveir triðingar av løgtingsmonnum krevja nýval av formansskapi.

**§ 37. Tingseta**
(1) Tingið kemur saman ólavsøkudag eftir gomlum siði.
(2) Tingið ger í síni tingskipan av, nær tingsetan byrjar og endar.

**§ 38. Tingsins virki**
(1) Tingið ásetur sjálvt tingskipan sína, og tingformaður skipar tingsins virki.
(2) Umframt tingmenn kunnu bert løgmaður, landsstýrismenn og onnur eftir formansins tykki møta og taka orðið á tingi.
(3) Løgtingsformaðurin boðar til fundar og kunnger dagsskrá. Ein triðingur av løgtingsmonnum ella løgmaður kunnu krevja, at tingfundur verður hildin.
(4) Skal uppskot verða samtykt á tingi, skal meirilutin av tingmonnum vera møttur. Eru fleiri fyri enn ímóti, er uppskotið samtykt.
(5) Tá ið tingið hevur umrøtt mál, kann tað gera sínar niðurstøður í samtykt.
(6) Tá tingsetan byrjar, greiðir løgmaður frá støðu landsins og tí, ið landsstýrið ætlar at fremja.

**§ 39. Nevndir**
(1) Tingið skipar seg í nevndir, og umboðini verða vald eftir lutfalli. Onnur álitisstørv kunnu veljast sambært tingskipan.

**§ 40. Innlit**
(1) Tingfundir eru almennir. Frítt er at endurgeva og varpa út tingfundir, men teir kunnu lokast, um tað er neyðugt.
(2) Løgtingsmenn kunnu, um ein triðingur av tingmonnum tekur undir, krevja frágreiðing frá løgmanni ella landsstýrismanni um almenn mál.
(3) Á sama hátt kann meirilutin av einari løgtingsnevnd krevja frágreiðing frá løgmanni og landsstýrismanni um almenn mál.
(4) Nevndarfundir kunnu vera almennir.

**§ 41. Sømdir tingmanna**
(1) Eingin má handtaka tingmann ella reisa ákæru ímóti honum uttan samtykki frá tinginum. Tó kann tingmaður takast á búri.
(2) Tingmaður kann bert við tingsins samtykki verða kravdur til svars uttantings fyri tað, hann sigur innantings.

## Landsstýrið

**§ 42. Myndugleiki**
(1) Landsstýrið er ovasti fyrisitingarmyndugleiki.

(2) Tó kann við lóg heimild verða latin nevndum, stýrum og ráðum at taka endaligar fyrisitingarligar avgerðir. Løgtingið kann ikki velja limir í hesar nevndir, stýri og ráð.

**§ 43. Fyrisitingarábyrgd**
(1) Landsstýrið skal fremja, halda og útinna hesa skipan og allar tinglógir.
(2) Løgmaður samskipar starv landsstýrismanna og hevur eftirlit við, at teir sita um málsøkini á lógligan og fullgóðan hátt.
(3) Løgmaður og landsstýrismenn hava rættarliga ábyrgd av fyrisitingini av teimum málsøkjum, sum eru løgd til teirra.
(4) Mál viðvíkjandi hesi rættarligu ábyrgd verða dømd av serligum nevningatingi. Reglur um hesa ábyrgd skulu ásetast í løgtingslóg.

**§ 44. Løgmansval**
(1) Annan dagin eftir val tilnevnir løgtingsformaðurin eftir samráð við nývalda Løgtingið samráðingarleiðarar at skipa landsstýri. Løgtingsformaðurin hann seta tíðarfreist á, og um ikki rokkið er á mál, kann hann hava nýtt samráð og tilnevna nýggjan samráðingarleiðara.
(2) Innan 10 yrkadagar eftir fyrsta tingfund eftir løgtingsval leggur løgtingsformaður uppskot um løgmansevni fyri Løgtingið. Løgtingið skal í seinasta lagi 4. yrkadagin eftir greiða atkvøðu um uppskotið. Eru fleiri atkvøður fyri enn ímóti, er løgmaður valdur. Eru fleiri uppskot um løgmann, ger tingið av, hvat uppskot fyrst kemur til atkvøðugreiðslu.
(3) Havnar Lløgtingið øllum uppskotum frá løgtingsformanninum um løgmansevni, boðar formaðurin aftur til samráðs sambært stk. (1) og setur innan 4 yrkadagar framaftur uppskot um løgmansevni, sum Løgtingið sama dag greiðir atkvøðu um.
(4) Um Løgtingið eftir fýra fundir ikki hevur valt løgmann, skrivar starvandi løgmaður út nýval til Løgtingið.

**§ 45. Skipan**
(1) Í landsstýrinum sita løgmaður og í mesta lagi sjey landsstýrismenn.
(2) Løgmaður tilnevnir og Løgtingið góðkennir varaløgmann.
(3) Løgmaður tilnevnir landsstýrismenn.
(4) Løgmaður kann loysa landsstýrismann og varaløgmann úr starvi. Atkvøður meirilutin av øllum tingmonnum fyri, skal løgmaður loysa landsstýrismann ella varaløgmann úr starvi.
(5) Atkvøður meirilutin av øllum tingmonnum fyri, verður løgmaður loystur úr starvi.
(6) Um tingið setir løgmann frá, ella løgmaður biður um at verða loystur úr starvi ella doyr, virkar landsstýrið sum starvsstjórn, til nýggjur løgmaður er valdur í seinasta lagi 10 yrkadagar seinni.
(7) Tá val er skrivað út, leggur løgmaður og alt landsstýrið frá sær. Løgmaður og landsstýrið halda tó fram sum starvsstjórn, til nýtt landsstýri er skipað.

**§46. Málsøki**
(1) Løgmaður býtir málsøki landsstýrisins millum landsstýrismenninar. Teir sita fyri málsøkjum sínum hvør sær.
(2) Løgmaður samskipar starv landsstýrismanna og boðar regluliga til landsstýrisfundar, har øll uppskot, sum skulu fyri Løgtingið, verða løgd fram.

**Fíggjarviðurskifti**

**§ 47. Skattur**
(1) Eingin skattur beinleiðis ella óbeinleiðis kann leggjast á, broytast ella avtakast uttan við lóg.
(2) Beinleiðis ella óbeinleiðis skattur ella gjøld kunnu ikki verða áløgd fyri virksemi, sum er farið fram, áðrenn lógaruppskot um hetta varð lagt fyri Løgtingið.

**§ 48. Fíggjarlóg**
(1) Landsstýrið leggur fyri mikkjalsmessu fram uppskot um fíggjarlóg landsins fyri komandi ár.
(2) Verður fíggjarlógin ikki samtykt fyri ársskiftið, skal landsstýrið leggja fram uppskot um fyribilsjáttan.
(3) Fíggjarlógin skal lýsa alt fíggjarvirksemi landsins.
(4) Allar almennar útreiðslur skulu hava heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg. Tó kann fram til 31. mars verða ávístur peningur av farnu fíggjarlógini fyri útreiðslur, ið havdar eru í farna fíggjarári.
(5) Allar almennar skuldbindingar skulu hava heimild í lóg.
(6) Við lóg kunnu stovnar leggjast uttan fyri fíggjarlógina.

**§ 49. Eykajáttan**
(1) Eykajáttan kann veitast við lóg.
(2) Er mál bráðneyðugt, kann Løgtingsins Fíggjarnevnd eftir uppskoti frá landsstýrinum veita eykajáttan, uttan so er, at ein triðingur av nevndarlimunum krevur málið avgjørt við lóg.
(3) Eykajáttanir, sum Fíggjarnevndin hevur veitt ígjøgnum árið, skulu góðkennast við eykafíggjarlóg í seinasta lagi 31. desember sama ár. Landsstýrið hevur skyldu at leggja fram eykajáttanarlógaruppskot hesum viðvíkjandi innan 1. desember.

**§ 50. Játtanarskipan**
(1) Almenn játtanarskipan skal samtykkjast sum lóg.

**§ 51. Roknskapir**
(1) Landskassaroknskapurin skal verða lagdur fyri Løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok.
(2) Landskassaroknskapurin við viðmerkingum grannskoðaranna verður innan 1. november lagdur fyri Løgtingið til samtyktar.
(3) Reglurnar í stk. (1) og stk. (2) verða eisini nýttar fyri roknskapir hjá almennum stovnum, sum hava sjálvstøðugan roknskap.

**§ 52. Grannskoðan**
(1) Tingið velur løgtingsgrannskoðarar og landsgrannskoðara. Virksemi teirra verður ásett í lóg.

**§ 53. Landsbanki**
(1) Landsbankin skal umsita tey fíggjar- og búskaparmál, sum við lóg eru løgd honum at umsita.

**§ 54. Búskapargrunnur**
Búskapargrunnur Landsins skal tryggja skynsama nýtslu av serinntøkum landskassans, og skipa rættvíst býti av hesum inntøkum millum verandi og komandi ættarlið. Grunnurin verður skipaður við lóg.

**§55. Eftirlit**
(1) Løgtingið ansar eftir, at landsstýrið virkar sambært lóg.
(2) Løgtingið kann skipa nevndir av tingmonnum at kanna mál av almennum týdningi. Nevndirnar hava rætt at krevja skrivligar ella munnligar upplýsingar frá privatum borgarum og frá almennum embætismonnum. Nevndirnar skulu, eftir at hava kannað málið, leggja frágreiðing fyri Løgtingið.
(3) Nevndirnar kunnu eisini krevja, at løgtingsformaðurin setir óheftan kanningarstjóra ella kanningarnevnd av serkønum at kanna og gera niðurstøður um embætisførslu løgmans ella landsstýrismanna. Hesi hava rætt at krevja skrivligar og munnligar vitnisfrágreiðingar frá embætisfólki og einstøkum borgarum. Niðurstøðurnar kunnu leggjast fyri dómstólarnar. Um 2/5 av øllum tingmonnum krevja tað, skal løgtingsformaðurin somuleiðis seta slíkan kanningarstjóra ella kanningarnevnd.

**§ 56. Løgtingsins umboðsmaður**
(1) At hava eftirlit við landsins fyrisiting velur Løgtingið Løgtingsins Umboðsmann, sum ikki kann vera tingmaður.
(2) Reglur um val og virki hjá Løgtingsins Umboðsmanni verða ásettar í lóg.

**§ 57. Uttanríkisvald**
(1) Landsstýrismaður varðar av uttanríkismálum og uttanríkistænastu mótvegis útlondum.
(2) Løgtingið velur uttanlandsnevnd, sum landsstýrið skal ráðføra seg við í sambandi við millumtjóða samráðingar og uttanríkispolitiskar avgerðir av serligum týdningi.
(3) Millumtjóða sáttmálar skulu samtykkjast av Løgtinginum.

# Sætti partur - samtykt og gildi

**§ 58. Samtykt og gildi**
(1) Henda stjórnarskipan eins og seinni broytingar í henni skulu samtykkjast á tingi, áðrenn fólkið tekur endaliga avgerð á fólkaatkvøðu í minsta lagi eitt hálvt ár seinni.
(2) Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya.
(3) Stjórnarskipanin ella broytingar í henni fáa gildi sama dag, sum fólkið hevur tikið avgerð sína.

**Viðmerkingar:**
§ 25-nevndin, sum Løgtingið valdi í desember 2008 (løgtingsmál nr. 31/2008), og sum varð vald aftur í august 2009 (løgtingmál nr. 1/2009) at gera uppskotið um stjórnarskipan fyri Føroyar klárt at leggja fyri tingið, er nú liðug við arbeiðið sítt.

Nevndin hevur havt tilsamans 26 nevndarfundir. Nógvir av hesum fundum hava verið í heilar dagar.

Nevndin hevur nýtt alt tað arbeiði, sum higartil er gjørt í sambandi við stjórnarskipan Føroya, sum grundarlag.

Endamálið hevur verið at finna breiðar politiskar semjur við støði í tí arbeiði, sum longu er gjørt, og at orða eitt uppskot, sum er á nøktandi løgfrøðiligum støði.

Nevndin hevur gjørt av at nýta stuttar, yvirskipaðar orðingar til tess at tryggja, at skipanin verður liðilig og væl egnað at tillaga seg broyttum umstøðum. Hetta er orsøkin til, at viðmerkingar ikki eru til tær einstøku lógargreinarnar. Nevndin metir, at rúmd eigur at vera givin fyri, at tulkingin av teimum einstøku greinunum kann broytast við tíðini.

Til tess at røkka hesum máli, hevur nevndin lutvíst sjálv arbeitt við uppskotinum, og lutvíst saman við umsitingini í Løgtinginum.

Harumframt hevur nevndin fingið skrivligar frágreiðingar frá serfrøðingum um ymisk viðurskifti, og kallað serfrøðingar inn í nevndina.

Eisini eru ávísir spurningar umrøddir við viðkomandi fólk.

Nevndin metir, at uppskotið nú er egnað at leggja fyri tingið til viðgerðar, og síðani til fólkaatkvøðu.

Tað hevur eydnast at fáa semju í nevndini um so at siga allar greinarnar í lógini.

Hóast nevndin leggur eitt felags uppskot fram, eru nevndarlimir, sum í tingviðgerðini vilja gera vart við serstøðu í ávísum greinum.

**Á Løgtingi, tann 27. februar 2010**

| | | |
|---|---|---|
| Poul Michelsen | Sjúrður Skaale | Helgi Abrahamsen |
| Hans Pauli Strøm | Høgni Hoydal | Jenis av Rana |
| Kári á Rógvi | Jaspur Vang | John Johannessen |
| | Jógvan á Lakjuni | |